Bára Michelsen

Fra: Sigurð Ó. Vang
Sendt: 15. oktober 2025 22:56
Til: Fíggjarmálaráðið
Cc: LV - Journal; Marjun Weihe Thomassen; Ingolf Joensen; Dan Sofus Hofgaard
Emne: Hoyringsviðmerkingar Landsverk til Ll. um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)

Fíggjarmálaráðið,

Vísa til til broytingarlógaruppskot tøkt á www.foroyalandsstyri.fo við hoyringsfreist 15. oktober 2025.

Yvirskipað metir Landsverk ætlanina við broytingarlógaruppskotinum at vera skilagóða.

Ítøkiliga vil Landsverk viðmerkja:

Viðv. § 7b, stk. 1 (eigur nokk at vera stk. 2!).
Ásett verður "*Stk. 1. Løguætlanin skal fevna um 12 ár. Tey fyrstu 3 árini eru at rokna sum bindandi og galda verkætlanir, sum kunnu verða liðugt projekteraðar og gjørdar klárar at koyra í útboð.*"
LV-viðm.: Tað eru ymiskir mátar at fyrireika og bjóða út løguverkætlanir (bygningar og anlegg/infrakervi). T.d. í sambandi við heildararbeiðstøkuútboð ella partalag er ikki talan um liðugt projekteraða verkætlan. LV vil mæla til at broyta ásetingina soleiðis, at tað er møguligt at hava ymsar arbeiðstøkuútboðshættir.

Viðv. 12 ára løguætlanum
LV-viðm.: Tað at gera 12 ára løguætlanir fyri løgur hjá stjórnarráðum vil krevja nakað meiri innsats, men metir LV, at tað samanumtikið vil stuðla undir góða planlegging og raðfesting. Í vaksandi mun verður arbeitt saman við stjórnarráðum um langtíðarætlanir.

Viðv. viðm. s. 4 "*Í rundskrivinum um lógarsmíð er ásett krav um, at lógaruppskot, kunngerðir o.tíl. skulu lýsa avleiðingarnar av øllum uppskotum komandi árini, men eisini um 10, 20 og 30 ár. Eisini er krav til verklagslógir, at kostnað-nyttu metingar so vítt gjørligt skulu verða gjørdar, men annars, at tær verða so væl lýstar við teimum avleiðingum, tær hava við sær. Arbeitt verður við øðrum tilmælum, t.d. um haldførisfrágreiðingar, lántøku og bygnaðarligt úrslit/avlop.*"
LV-viðm.: Galdandi rundskriv nr. 9001 frá 26. november 2018 um rundskriv um lógarsmíð inniheldur ikki áetingar um avleiðingar 10,20, 30 ár fram og ei heldur kostnað-nyttu metingar. LV metir at tað kann vera viðkomandi við slíkum ásetingum, men helst ikki í øllum førum. Kostað-nyttu metingar eru mest vanligar at gera í sambandi við infrakervisverkætlanir. So mæla til at slíkar kanningar eiga at vera umhugsaðar í hvørjum einstøkum føri.

Bestu heilsur,

SIGURÐ Ó. VANG
Deildarleiðari | Head of Divison
Verkætlanardeildin | Division of Design and Construction
+298 290 871 // www.landsverk.fo

LANDSVERK

Øll málsviðgerð hjá Landsverki er fevnd av dátuverndarlógini.
Kunning um dátuvernd er at finna her.